# Nýggj útbjóðing um 2–3 ár



*Fyrsti oljuboripallurin í føroyskum sjógvi avmyndaður hósdagin*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

OLJULEITING
*Jan Müller*

– Vónandi gongur tað ikki ov long tíð til latið verður upp fyri tí næstu útbjóðingini á landgrunninum. Hon verður so eftir fyrstu boringarnar í 2002 og áðrenn 6 ára loyvini ganga út. Tað er tí ikki órímuligt at ganga út frá næstu útbjóðing í 2003 ella 2004.

Eyðun Elttør kann ikki í dag siga nakað um komandi útbjóðingarøki, men hann hevur lagt til merkis, at loyvini, sum eru latin í seinastu bretsku útbjóðingini liggja heilt upp at føroyska markinum frá »Gullhorninum« og norðureftir. Tað er tí sannlíkt, at økini upp at bretsku loyvunum kunnu gerast partur av eini føroyskari nr. 2 útbjóðing.

# Nevnd at umsita kolvetni

OLJA OG TINGIÐ
*Jan Müller*

Landsstýrismaðurin í oljumálum tekur væl ímóti uppskotinum hjá formanni Javnaðarfloksins at sett verður nýggj tingnevnd at taka sær av oljumálum burturav.

Á sama hátt sum tað var skilagott í síni tíð at skilja oljumálini frá øðrum vinnumálum og skipa eitt heilt nýtt Oljumálastýri, heldur landsstýrismaðurin tað nú eisini vera rætt at umhugsa at skilja oljumál frá arbeiðinum hjá tingsins Vinnunevnd.

– Finna vit olju, so verða uppgávurnar og harvið støðutakaninar so nógvar og álvarsamar, at hetta eigur at verða viðgjørt í serstakari tingnevnd.

Landsstýrismaðurin heldur vit eisini eiga at umhugsa, um henda tingnevnd ikki eisini eigur at umsita orkumál, sum hava við bæði olju, gass, vatn, vind, sól – og aðra orku at gera.

Eyðun Elttør heldur tað annars vera reelt – nú alt oljumálið er so mikið umfatandi og týðandi – at allir flokkar draga eina línu.

– Vit hava brúk fyri at allir flokkar og tingfólk eru við í bæði tilrættaleggingini og avgerðunum í hesi so avbjóðandi vinnu. Tí bjóði eg eisini øllum flokkum at vera við í komandi dialoginum um oljuna og føroyska samfelagið.

Nettupp tí heldur Eyðun Elttør tað eisini vera gott, tá aðrir flokkar – ikki minst teir í andstøðuni – koma við konstruktivum uppskotum. – Hetta er so stórt mál, at allir flokkar í Føroyum mugu vera við í komandi menningini.

# Vit mugu hava stýringina um hendi

**– tá møgulig olja er funnin og avgerðir skulu takast um framleiðslu, sigur Eyðun Elttør, sum metir tað vera rætt tá at seta ráðleggingarbólkar at stuðla myndugleikunum**

RÁÐLEGGING OG OLJA
*Jan Müller*

Oljuráðleggingarnevndin gjørdi eitt ótrúliga gott arbeiði og legði lunnar undir ta gongd, sum hevur verið. Hon gjørdi sær eisini tankar um møguligu gongdina eftir, at olja er funnin. Hóast tørvur ikki í dag er á eini líknandi oljuráðleggingarnevnd, nú vit hava bygt upp oljufyrisiting á fleiri økjum, so heldur Eyðun Elttør, landsstýrismaður, at landsstýrismaðurin í oljumálum og Oljumálastýrið í framtíðini eiga at hava eina ella aðra fasta ráðgeving, eitt slag av »sparringspartnara«, sum hann málber seg.

– Men eg haldi ikki tað er rætt at seta slíka ráðgevandi nevnd her og nú. Latið okkum fyrst síggja úrslitið av hesum fyrstu boringunum. Men verður olja funnin, er greitt, at okkum fer at tørva ráðgeving um hvussu vit skulu bera okkum at viðvíkjandi framleiðslu, nær feløgini skulu sleppa undir framleiðslu, nær feløgini skulu sleppa undir framleiðslu, hvussu oljan skal framleiðast, fáast fram til marknaðin, um vit skulu samstarva við grannalond um oljuleiðingar, um oljan skal flytast við skipi og hvaðar osfr. Vit mugu hava stýringina á øllum hesum og fyri at kunna tað er neyðugt at seta ymsar bólkar at ráðgeva okkara myndugleikum.

Skuldi tað ótrúliga hent, at allar tríggjar boringarnar í ár geva positivt úrslit, t.v.s. staðfesta lønandi oljufund, tá verður tað uppgávan hjá føroyskum myndugleikum at meta um, hvussu skjótt farast skal fram og í hvussu stóran mun. Tað vil sjálvandi verða nakað, sum tosað verður við oljufeløgini um, men tað snýr seg so eisini um, hvat føroyska samfelagið heldur og vil, vísir Eyðun Elttør á.

## Samfelagslig árin

Eyðun Elttør sigur víðari, at umframt ráðleggingina til Oljuumsitingina, so tørvar Føroyum eisini ráðlegging í sambandi við samfelagsligu árinini av oljuvinnuni annars. Tað var eisini tí, at skotið varð upp, at Mentamálstýrið setti bólk at ráðgeva í sambandi við árinini, ið eini oljuvinna kann fáa fyri samfelagið Føroyar.

## Framleiðsla 2004

Spurningurin um nær møgulig oljuframleiðsla skal byrja, verður oljufund gjørt longu í heyst, kemur sjálvandi at hava ávirkan á alla víðari oljutilgongdina í Føroyum. Herfyri skeyt stjóri í einum av oljufeløgunum, sum bora her í summar, upp, at verður olja funnin, so vil felagið – umføroyskir myndugleikar halda tað vera skilagott –fara undir at fyrireika oljuframleiðslu skjótt eftir fund. Soleiðis at fyrsta oljan spríkir upp longu í 2003 ella 2004. Hetta er tó ikki bara sum at siga tað. Tí eftir tí sum Sosialurin skilir, so vil ein »ov skjót« framleiðsla gera, at tú fær ikki optimalt burtur úr goymslunum. Hon merkir so eisini, at tú fær ikki stundir til at byggja egnan boljuterminal í Føroyum. T.v.s. at ein heilt skjót útbygging kann hava við sær, at Føroyar mugu brúka oljuterminal í eitt nú Hetlandi. Eyðun Elttør er fegin um hetlendsku tilboðini at brúka Sullom Voe til goymslu av føroyskari olju, men vísir á, at føroysk lóg sigur, at oljan skal í land í Føroyum.

Eyðun Elttør heldur tað vera ov tíðliga nú at avgera, hvar møgulig føroysk olja skal fara, men hann heldur, at vit mugu ikki avskriva møguleikarnar at taka oljuna í land í Føroyum. Hetta kann eisini verða ein partur av samráðingunum við oljufeløgini – t.v.s. hvat er skilabest fyri Føroyar og tey. – Men hetlendsku tilboðini mugu so eisini verða við í okkara metingum, leggur hann afturat.



*Eyðun Eltør, oljumálaráðharri og løgmaður á vitjan á "Sovereign Explorer" hósdagin*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

# Røtt avgerð at bíða við almennum oljufelag

**– og heldur brúka allar kreftir uppá oljufyrisitingina, heldur Eyðun Elttør, landsstýrismaður**

FØROYSK OLJUUMSITING
*Jan Müller*

Nú oljuboringin er byrjað av álvara, heldur Eyðun Elttør framvegis, at tað var rætt ikki at taka eitt alment føroyskt oljufelag – út frá tí støðu vit eru í í dag.

– Tað var rættari at byggja út eina føroyska umsiting og fáa tey røttu fólkini til hana, heldur enn at spjaða resursirnar og tá kanska ikki fingið so nógv burtur úr sum nú. Eitt alment oljufelag vildi kravt menniskjaligar resursir, sum vit hava brúkt í okkara oljufyrisiting. Tað hevði verið smábýtt, skuldu vit fordeilt hesar resursir.

Landsstýrismaðurin sigur seg annars ikki hava avskrivað eitt alment føroyskt oljufelag, men í hesi fasuni – har vit ikki vita um nøkur olja er – eiga vit at brúka alla okkara orku uppá umsitingina, heldur enn at gera tingini hálvt.

Umframt at tosa um alment føroyskt oljufelag, so kann tað eisini koma upp á tal einaferð at hava føroyska luttøku í møguligari rørleiðingarskipan á Atlantsmótinum.

# ítróttur

Nr. 133 • leygardagur • 14. juli 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

**Hví fækka heiðursmerkini?**

**Lesið eisini samrøðuna við Petur Heðin av Fløttu inni í síðuni**

# Elituarbeiðið skal í gongd

**Ási Mikkelsen er sannførdur um, at verður eitt veruligt elituarbeiði ikki sett í gongd í Føroyum, verður hetta endin á heiðursmerkjasavnanini hjá bæði frælsum ítrótti og svimjing**

ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Eftir at frælsi ítrótturin fyri tveimum árum síðani vann hópin av heiðursmerkjum heim til Føroya, hevur talan bert verið um tvey úr bronsu hetta árið.

Ein av teimum, sum hevur mist sítt heiðursmerki, er Ási Mikkelsen, sum vann silvur á Gotlandi, men í ár mátti taka til takkar við fjórða plássinum.

## Støðið er hækkað

Spurdur, um hvørjar orsøkirnar til hetta, sigur Ási, at orsøkirnar til hetta er tvinnar.

- Fyrst og fremst var tað tað, at eg leyp ov stutt. Møguleikarnir fyri at kiksa í eini slíkari kapping eru altíð størri, enn tá tú ert heima, og við hvørt kiksar tað.

- Hinvegin er støðið í kappingini nógv hækka seinnu árini, og meðan eitt lop oman fyri sjey metrar við vissu gav gull fyri fýra árum síðani, so gevur hetta bara bronsu í dag, sigur Ási.

Støðið á Oyggjaleikunum hevur enn ikki nátt altjóða støðinum, men tað er komið upp á tað sama, sum tú sært í Norðurlendskum kappingum. Og tað er soleiðis í Danmark og Noreg og fyri sóvítt eisini Svøríki, at tú vinnur ikki eitt meistaraheitið uttan so, at tú hevur vant miðvíst í minst eini tíggju ár.

- Tað er soleiðis, at tú noyðist at laga teg eftir ítróttini. At gera hana til ein lívsstíl, og tað er ikki fyrr enn tú hevur vant soleiðis í eini tíggju ár, at tú kanst vinna heiðursmerki á slíkum stevnum.

## Kreppan hjálpti ítróttini

Eitt er lívsstílur. Nakað annað eru umstøðurnar, og her kann so ikki sigast annað enn tað, at føroyingar als ikki hava sama møguleika, sum mótstøðumenninir hava. Ási er eisini samdur i hesum, og hann hevur eisini eina greiða støðu til, hví Føroyar seinnu árini hava verið við í kappingini um heiðursmerki.

*– Líka mikið, hvussu stórt talentið er, so hjálpir tað einki, um tað ikki verður uppdagað, fyrr enn tú ert 22 ella 23 ára gamal*

- Tey, sum kappast um heiðursmerki fyri Føroyar í dag, tað eru fólk, sum vóru fyrst í 20'unum, tá kreppan var í Føroyumk. Hópur av ungfólki fluttu til Danmarkar, og tey, sum tá fóru í holt við at íðka frælsan ítrótt, hava nú verið aktiv í eini 10 ár.

- Tað, sum hendir nú, er, at tað gongur øgiliga væl í Føroyska búskapinum, og fólk flyta heimaftur. Á ein hátt kanst tú siga, at kreppan var góð fyri frælsan ítrótt í Føroyum.

## Weekend-bumsar

Eftir at hava sagt sína hugsan um hetta, vendir Ási aftur til tosið um at gera ítrótt til ein lívsstíl, og her heldur hann avgjørt ikki, at føroyingar eru nóg væl fyri.

- Elitu ítróttur er so at siga ikki til í Føroyum. Tú mást gera upp við teg sjálvan, hvat ítróttur yvirhøvur er.

- Í Føroyum er tað gjarna soleiðis, at tú bara íðkar ítrótt helvina av árinum. Til dømis eru føroyskir fótbóltsspælarar »weekendbumsar« helvtina av árinum, og við einum slíkum hugburði, so nært tú ikki einum støði, har tú fært savnað fleiri heiðursmerki á eitt nú Oyggjaleikunum.

- Tað er helst eisin ein spurningur um at skapa ein ella annan form fyri elituarbeiði, sum vit ongan tíð hava havt.

## Hini satsa øðrvísi

Yvirhøvur tykist tað annars vera soleiðis, at føroyingar á Oyggjaleikum vera betri fyri, tá talan er um liðkappingar, heldur enn í kappingum fyri einstaklingar. Spurdur um talan kanska er um eitt slag av »jantelov« sigur Ási, at tað heldur hann ikki.

- Eg veit ikki rættiliga, men tú kanst venda tí hinvegin. Tekur tú okkurt av føroysku liðunum, sum eru við her, og tveitir tey í eina norðurlendska kapping, so høvdu tey neyvan staðið seg.

- Tað er helst soleiðis, at støðið á einstaklingunum, sum eru við her, er hægri enn hjá liðunum. Sjálvandi eru framvegis nøkur hol, men tað verða alt fleiri greinar, har medaljuvinnararnir hava norðurlendskt støði.

- Eg haldi eisini, at tað er soleiðis, at onnur lond í størri mun satsa upp á einstaklingarnar enn lið. Tey siga sum so, at um vit eru 60.000 fólk, so kunnu vit ongan tíð fáa eitt lið, sum hevur altjóða støði. Tá finnast ikki nóg nógv, sum eru nóg góð. Hinvegin kunnu vit kanska finna onkrar einstaklingar, sum kunnu standa seg, og tí hava tey heldur valt at satsa upp á elituarbeiðið.

- Tú ert noyddur til at hava elituarbeiðið í slíkum førum, tí líka mikið, hvussu stórt talentið er, so hjálpir tað einki, um tað ikki verður uppdagað, fyrr enn tú ert 22 ella 23 ára gamal.

- Skal tað ikki merkja endin á heiðursmerkjarøðini fyri frælsan ítrótt í Føroyum – og helst eisini fyri svimjingina – so eru vit noydd til at finna ein ella annan form fyri elituarbeiðið, sigur Ási Mikkelsen at enda.






*Meðan eitt lop á sjey metrar nærum við vissu gav gull fyri fýra árum síðani, so er hetta bert nóg mikið til bronsu í dag, sigur Ási Mikkelsen um hækkandi støðið á Oyggjaleikunum*